








Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



# Globalisering ikki nøkur hóttan

**- Framtíðin hjá útflutningsvinnuni hjá smærri tjóðum liggur í fríhandilsavtalum. Tí ræður um at síggja globaliseringina sum ein fyrimun, heldur enn eina hóttan, sigur Grétar Már Sigurðsson, deildarstjóri í íslendska Uttan-ríkismálaráðnum**

HANDILSPOLITIKKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Skal føroysk útflutningsvinna gera seg galdandi í altjóða høpi, treytar tað ein nýggjan hugburð mótvegis globaliseringini og stórum altjóða samtøkum. Hetta vóru millum annað boðini, landsstýrið og uttanlandsnevndin fingu, tá stjorin á handilsdeildini í íslendska Uttanríkismálaráðnum Grétar Már Sigurðsson vitjaði í Føroyum í síðstu viku.

## Europeiskur heimamarknaður

Seinastu 5-10 árini er tað eydnast íslendsku stjórnini og vinnuni at kollvelta hugsunarháttin hjá íslendingum, tá tað ræður um dirvið til at gera seg galdandi í altjóða handilshøpi. Frá at vera ein tjóð, sum burtursæð frá fiskaútflutninginum, stórt sæð bara dúvaði uppá íslendska heimamarknaðin, hava íslendingar sett kikaran fyri hitt eygað og arbeiða nú miðvíst við at skapa nýggjar útflutningsmøguleikar gjøgnum fríhandilsavtalur. Aðalmálið er at beina burtur allar forðingar fyri handli við umheimin, og við EFTA sum platformi er tað eydnast at fáa í lag fríhandilsavtalur við lond um allan heim, sum vóru óhugsandi fyri bert fáum árum síðani. Grétar Már ivast ikki í, at hetta bert er byrjanin, tí nýggjar og betri avtalur verða gjørdar alla tíðina.

– Tú kanst siga, at vit nú hugsa um Europa sum okkara heimamarknað og savnað okkum um at framleiða tað, vit duga best, heldur enn bara at hava íslendska marknaðin í huga, sigur Gretar Már. Hann leggur afturat, at hetta millum annað hevur havt við sær, at fiskaútflutningurin spælir ein alsamt minni leiklut í samlaða útflutninginin, samstundis sum aðrar vørur og tænastur allatíðina koma afturat. Eitt nú er útflutningurin av aluminium vaksin munandi seinastu árini, samstundis sum kunningartøkni, tónleikur, filmsframleiðsla og design vinda alt meir uppá seg.



*– Treytin fyri, at smærri lond kunnu menna sína útflutningsvinnu, er, at tey halda uppat at ræðast stór altjóða samtøk, sigur Gretar Már Sigurðsson.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Váðaspjaðing

Hóast Grétar Már er sannførdur um, at broytti hugburðurin hjá íslendingum mótvegis síni egnu støðu í altjóða høpi hevur havt ein avgerandi leiklut, leggur hann dent á, at onki av hesum hevði borið til, uttan so at politisku myndugleikarnar vóru sinnaði at gera sítt. Í 1997 var eitt nú ein uttanlanda handilstænastudeild sett á stovn undur Uttanríkismálaráðnum. Deildin hevur sum uppgávu at samskipa arbeiðið hjá handilsráðgevum á íslendskum sendistovum runt um í heiminum fyri á tann hátt at betra um møguleikarnar hjá íslendskum fyritøkum uttanlanda. Eisini innanhýsis eru fíggjarligu karmarnir hjá vinnuni broyttir munandi síðani ferð kom á at einskilja stóru bankarnar og fyritøkur fyri at lata upp fyri privatum íleggjarum og útlendskum kapitali. Afturat tí hevur virðisbrævamarknaðurin, sum lat upp seinast í 1980unum, spælt ein týdningarmiklan leiklut fyri moderniseringina av einum lutfallsliga lítlum og ofta stirvnum fíggjarmarknað.

- Hetta snýr seg eisini um at spjaða íløgurnar og harvið váðarnar, so vit ikki vera so viðbrekin í búskaparligum niðurgangstíðum. Sæð á tann hátt, er tað jú eyðsæð, at smærri lond fáa nógv størri nyttu av globaliseringini og fríu atgongdini til altjóða handilsmarkanaðin, enn tær stóru tjóðirnar, sigur Grétar Már Sigurðsson.

Hyundai Getz kosin "Årets Bestseller"

Millum 20 tey mest seldu bilmodellini í Danmark bleiv Hyundai Getz 1,3 við 5 hurðum valdur sum tann mest økonomiski bilurin at koyra í.
Tað sæst á tænastusíðuni www.bilpriser.dk, sum eisini hevur kosið Hyundai Getz til "Årets Bestseller 2003"




**Bilurin uttan:** Snøggar linjur allan vegin runt! Hyundai Getz fær fólk at venda sær á í ferðsluni.
Eingin ivi er um at Getz er ein fragd fyri eygað og tekur seg væl út í føroyska landslagnum.
Hesin eleganti bilurin rúmar lættliga 4 vaksnum persónum, gott pláss er til beinini og høgt til loftið.
Tú kennir altíð Hyundai Getz aftur í ferðsluni við t.d. síðuspeglunum í sama liti sum bilurin, smartum juvel-baklyktum, og eini útstráling framman sum vísir á ætlanina hjá Hyundai við hjá Getz'inum: **FRAMFÝSNI VIÐ STÍLI!**

HONDA · NORÐBIL · ŠKODA Volkswagen Group · HYUNDAI

BOX 1070 · OYGGJARVEGUR · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 313707 · FAX 310855